# - Hetta kundið verið partur



WendyScottogJohanna: Wendy Scott prátar við Jóhannu av Steinum, ið Wendy Scott metir kann koma langt í mótaheiminum.



*Barbara í Gongini roynir altíð at bróta mørk við sínum mótasýningum og í gjár var einki undantak.*

**Lovorðini hjá háttvirdu ensku mótablaðkvinnuni og antropologinum Wendy Scott vóru stór um føroysku sniðini, ið hon sá á mótasýningini á Funky Faroe Islands ráðstevuni í London.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Útvið hundra fólk vóru savnaði til stóra PR showið Funky Faroe Islands í Sommerset House mitt í London, hesi vóru umframt føroysku luttakararnir umboð fyri miðlar, mótaídnað og tónleikaídnað.

Bretska mótablaðkvinnan Wendy Scott skipaði fyri pallborðsfundinum um móta týsdagin, og hon var millum tey, ið sóu føroysku mótasýningina. Eftir mótasýningina fingu vit orð á royndu og háttvirdu blaðkvinnuna.

- Eg var til allar sýningarnar á London Fashion Week og hetta er minst líka gott, var skoðsmálið, ið Wendy Scott gav føroysku sniðunum, ið Guðrun Ludvíg, Elisa Heinesen, Jóhanna av Steinum og Barbara í Gongini, sýndu fram.

- Eg var eisini glað at síggja at nærum øll tey, sum vóru við pallborið í gjár vóru og hugdu at sýningini, og teimum dámdi væl tað, ið tey sóu, greiddi Wendy Scott frá.

- Framsýningin var øgiliga góð, serliga í kraft av, at tær fýra sum hava sniðgivið eru so øgiliga ymiskar, tær eru hvør sær unikkar. Hetta var stutt sagt eitt gott bland, segði hon og helt fram:

- Eg beyt serliga merkið

# Teitur ger føroyska fløgu



*Føroyska Teitur fløgan verður fylgd upp við eini konsertferð í Føryum*
*mynd: nud*

**Teitur og føroyska plátufelagið TUTL eru komin ásamt um avtalu um upptøku og útgávu av eini nýggjari Teitur fløgu, hendan verður á føroyskum.**

FUNKY FAROE ISLANDS

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í fyrra kvøldið spældi Teitur í París, ígjár í London, fríggjakvøldið í Bordeux, og hann er júst heimkomin til Evropa eftir konsertferð í USA. Bæði seinastu og komandi mánaðirnir eru fullir av Teitur konsertum kring allan heim, millum annað stendur Vietnam á skránni. Men innast inni bukar hjarta hjá Teiti fyri Føroyum.

- Eg skrivi enn nógvar sangir á føroyskum, og tað havi eg altíð gjørt, so tí havi eg avgjørt, at fara at útgeva eina fløgu við føroyskum løgum, sum bert verður givin út í Føroyum, sigur Teitur. Hann er komin ásamt við plátufelagið TUTL, um at felagið stendur fyri upptøku og útgávukostnaðinum.

Kristian Blak, ið er dagligur leiðari av TUTL, sigur at felagið gleðist um avtaluna við fremsta føroyska tónleikanavnið.

Hann sigur orsøkin til, at Teitur velur at útgeva á TUTL ístaðin fyri sínum egna plátufelag Arlo & Betty, er tann, at hetta er ein fløga, ið verður gjørd bert til føroyska marknaðin.

- Tað er týdningarmikið at halda hetta atskilt frá altjóða profilinum hjá Teiti. Sjálvandi eru útlendskir fans vælkomnir at keypa fløguna, men hon verður bert útgivin í Føroyum, sigur Kristian Blak. Sum tó heldur, at tað kundi verið áhugavert at givið fløguna út í Íslandi eisini. Tí sangir á føroyskum eru rættliga vælumtóktur har, og TUTL hevur júst undirskrivað sáttmála við íslendskt plátufelag um útbreiðslu av TUTL fløgum í Íslandi.

Enn er einki avgjørt um hvar upptøkurnar verða gjørdar, men nakrar eru longu gjørdar á konsertferðunum ymsastaðni kring heimin. Tað verður fasti konsert ljóðmaðurin hjá Teiti, Jónas Bloch Danielsen, ið fer at standa fyri upptøkum og ljóðblandi. Bólkurin, ið spælir við Teiti á fløguni er sami bólkur, sum hann ferðast við á altjóða konsertferðunum, og sami bólkur sum spælir á nýggjastu fløguni.

- Eg havi arbeitt við hesum øgiliga leingi, greiður Teitur frá.

- Eg gav Sólin og Regnið út, beint áðrenn eg skuldi í gongd við at gera Poetry and Aeroplanes. Á Sólin og Regnið eru løg, sum eru skrivaði innan fyri nakrar fáar vikur og spæld inn. Alt projektið var skundað í gjøgnum, og eg gjørdi hana mest sum á einum beini. Eg kundi hugsa mær, at gjørt tað ordiligt hesaferð, sigur Teitur.

Hetta merkir millum annað, at Teitur ætlar at promovera fløguna við at fara á eina stóra konsertferð í Føroyum, har Teitur og bólkurin spæla í hvørjum króki. Tað er einki at taka feil av, Teitur ljóðar sera eldhugaður um verkætlanina, ið føroyingar kunnu byrja at gleða seg til.

## Vogue bað um myndir

Teir báðir føroysku myndamenninir, ið tóku myndir av Mótaframsýningini Funky Faroe Islands, hava fingið ein risa møguleika fyri at fáa sínar myndir í heimsins størsta mótatíðarrit. Enska útgávan av Vogue, setti seg gjøgnum blaðkvinnuna Wendy Scott í samband við myndamenninar og bað um, at fáa teirra myndir av framsýningini við føroyskum sniðum sendandi, soleiðis at blaðið kundi gera taka støðu til, um hesar skuldu prentast í blaðnum. Janus Gunnarsson, ið var ein av myndamonnunum til tiltakið legði ikki skjól á, at hetta var ein spennandi avbjóðing, og hann ætlaði tí uttan at blunka at senda myndirnar til Vogue.

**nud**